# Ábyrgdaloysi út um alt sømiligt mark

**Jóannes Eidesgaard**



Lat meg leggja fyri við at siga, at hetta verður skrivað við fullari virðing fyri verkfaldsrættinum.

Hóast verkføll hava verið næstan dagligur gestur seinastu fýra árini, og hóast Suðuroyggin fram um aðrar oyggjar altíð verður harðast rakt av hesum verkføllum, tí Smyril konsekvent verður lagdur, so haldi eg støðan beint nú er farin út um alt sømuligt mark.

Leiðslan á Strandfaraskipum tók einvegis ta avgerð, at Smyril ikki skuldi fara suður, hóast verkfallið ikki tá var lýst. Upplýst varð, at tað skuldu vera tí, at Smyril lá tryggari í Havn. Løgin niðurstøða, tá hann annars liggur á Tvøroyri hvørja einastu nátt á árinum. Liggur hann tá ótryggur allar hinar næturnar av árinum?

Men hetta er samstundis ein sera grunn og lítið umhugsað avgerð. Suðuroyarfjørður er okkara einasta samband til meginøkið og til útlandið. Hetta er okkara landsvegur til meginøkið, soleiðis sum landsveganetið norðanfjørðs er tað fyri hini økini. Men teir vegirnir eru opnir, og gerandislívið fyri ein stóran part av landinum er als ikki nervað av verkfallinum. Men suðuroyarsiglingin er vorðin "prügelknabend," hvørja einasta ferð verkfall hevur verið..

Skipara- og navigatørfelagið og myndugleikarnir hava gjørt semju um, at Teistin og Ternan liggja klárir til sjúkraflutning. Og sambært Ellindi eru teir til reiðar at víðka hetta til eisini at fevna um Smyril, um myndugleikarnir ynskja tað. Men tað ynskja myndugleikarnir so ikki. Teir vilja hava Smyril liggjandi í Havn.

Sjálvandi skulu Sandoyggin, Vágarnar, Norðoyggjar og útoyggjarnar hava skip, sum liggja klár at sigla, um okkurt skuldi borist á, og tyrlan ikki fær flogið. Hetta er ein mannarættur. Men hvussu er støðan hjá Suðuroynni undir hesum verkfallinum? Tyrlan er tíbetur tøk, tá á stendur, men hon hevur nakrar rættiliga stórar avmarkingar, umframt at hon eisini skal røkja síni egnu rutu. Er veðrið verri enn eitt ávíst, t.d. vánaligt sýnið, so flýgur hon ikki. Og tað vita vit av royndum, at tað kemur ofta fyri.

Hvat nú um neyðugt verður við sjúkraflutningi, og eingin tyrla kann flúgva? Í skrivandi løtu er øll tryluflúgving avlýst orsakað av vánaligum flúgvilíkindum, og Smyril liggur svínabundin í Havn. Hvat nú um neyðugt verður við einum akuttum sjúkraflutningi? Hvør hevur tá eina trygga støðu? Smyril, tí hann liggur tryggur á Havnini? Leiðslan á SL? Ella sjúklingurin ella avvarðandi?

Sjálvandi skal Smyril liggja her á Drelsnesi og við fullari manning soleiðis, at um tað gjørdist neyðug við sjúkraflutningi, so skal hann kunna loysa beinanvegin.

Hetta er ein sera grunn, sera óbúgvin og beinleiðis hættislig avgerð, sum leiðslan á SL hevur tikið, og eg kann vissa tykkum um, at seinasta orðið er ikki sagt í hesum málinum.

# Fullveldi ella lívsfrælsi

**Eyðgunn Samuelsen**
*Valevni hjá Javnaðarflokkinum í Norðoyggjum*



Fyri 4 árum síðani kom fullveldi á skránna, og tá ið henda ætlan miseydnaðist, var ístaðin samtykt ein lóg, ið skuldi minka blokkin og yvirtaka málsøkir til vit í 2012 eru klár at loysa.

Men hvat er fulveldi? Jú tað er, at Føroyar sum land er sjálvstøðugt, men hvat við fólkinum og teirra frælsið? Vit í Javnaðarflokkinum siga fólkið fyrst og meina tað!! Vit skulu øll hava lívsfrælsi, ið vil siga, at vit skulu hava javnbjóðis møguleikar til arbeiði, útbúgving, búseting, pensión, røkt og ein tryggan aldurdóm.Vit siga, tað nyttar onki at hava eitt sjálvstøðugt land uttan at fólkið hevur eitt gott lív.

Vit hava onki ímóti, at vit tá ið fólkið ynskir tað fara úr ríkisfelagsskapinum og hetta skal gerast á ein tryggan hátt. Støðan í dag er tann, at fólkið vil ikki loysing nú og tað er í mínum hugaheimið natúrligt tí vit hava liva 50 ár í ríkisfelagsskapinum og tí kann ein ikki noyða eina loysing ígjøgnum eftir 2 ella 4 árum, sum ætlanin var hjá sitandi samgongu.

Okkara loysn er ein sjálvstýrislóg ið endurnýggjar og dagførir tað samstarv sum er í ríkisfelagsskapinum, lógin skal eisini áseta hvussu vit fara úr ríkisfelagsskapinum um vit ynskja tað. Vit halda tað er skeivt at vit ið nú eru í politikki taka hesa avgerð fyri føroyska fólkið, tað eru tey ið hava valrætt til tað tíð ið skulu avgerða hetta.

Fyri Javnaðarflokkin koma livikorini hjá vanliga fólkinum altíð at koma framum loysing frá Danmark, tí loysing er ein formligur spurningur meðan fólkið og teirra lívskorð er ein ítøkiligur spurningur.

Ynskir tú tíni lívskorð ovast á skránna, so velur eisini tú Javnaðarflokkin tann 30 apríl.

Eydgunn @post.olivant.fo

# Samgongan helt ikki givin lyfti

**Vilhelm Johannesen**
*valevni javnaðarfloksins í Norðoya valdømi*



Tá samgongan millum fólkaflokkin, tjóðveldisflokkin og sjálvstýrisflokkin varð skipað eftir valið 30. apríl 1998, fingu tit veljarar lyfti um tvær fólkaatkvøður. Á hesum fólkaatkvøðum skuldu tit sleppa at siga tykkara hugsan í spurninginum um ríkisrættarligu viðurskiftini.

Men tá tølini í veljarakanningunum bendu á, at tit ikki fóru at taka undir við samgonguni í ríkisrættarliga spurninginum, vórðu báðar fólkaatkvøðurnar avlýstar. Samgongan tordi ikki at geva tykkum veljarum orðið, tí vandi var fyri, at tit høvdu aðra áskoðan enn teir, men nú týsdagin 30. apríl hava tit orðið. Nú sleppa teir ikki undan.

Nú siga samgonguflokkarnir, at teir skulu loysa øll tey mál, sum hava ligið á láni seinastu fýra árini. Nú skulu teir loysa ellis- og røktarheimsspurningin, sum teir onki gjørdu við hesi fýra árini, og nú skulu teir eisini loysa eftirlønarspurningin, ið teir heldur onki gjørdu við í hesum valskeiðnum. Nú vilja teir gera nakað við øll tey mál teir onki gjørdu við í fýra ár.

Nú fáa tit aftur gylt lyfti um, at teir skulu loysa øll møgulig mál á almanna- og heilsuøkinum, á útbúgvingarøkinum, á samferðsluøkinum, íbúðarøkinum, skatta- og avgjaldsøkinum, á barnaansingarøkinum o. s. fr. og o. s. fr. Men trúgva tit teimum hesa ferð. Í spurninginum um fólkaatkvøðurnar sviku teir tykkum vejarar. Teir tordu og vildu ikki geva tykkum orðið.

Teir lupu frá givnum lyftum í hesum valskeiðnum. Kunnu tit vænta nakað annað í komandi valskeiði? Nei og aftur nei! Javnaðarflokkurin er og verður einasta greiða alternativið til sitandi samgongu. Javnaðarflokkurin hevur loysnina í spurninginum um ríkisrættarligu viðurskiftini. Hann hevur eisini loysnirnar í øllum hinum málunum.

Farið tí mannsterk á val og seti ein sterkan javnaðarflokk inn á Føroya Løgting. Seti X við lista C ella eitt av valevnunum á lista javnaðarfloksins í tykkara valdømi. Gott val.

# Skatturin

**Heðin Mortensen**
*løgtingsmaður*



"Miðað verður eftir at linka skatta- og avgjaldstrýstið á húsarhald… Málið er ein so høg skattafrí grundarupphædd sum møguligt og so lágt skattatrýst sum møguligt. Lagt skal vera upp fyri, at láginntøkur og barnaríkar familjur verða ikki fyri vanbýti. Hjún, har annað hevur alla inntøkuna, verða at javnstilla við hjún, har bæði hava inntøku. Grundarupphæddin í fólkapensjónini verður skattafrí."

Hetta stendur í samgonguskjalinum hjá brátt farnu samgongu. Onki av hesum er vorðið veruleiki. Onki.

Eftir valið tann 30. apríl verður vónandi ein nýggj samgonga skipað, sum hevur lægri skattatrýst sum mál, ikki bert sum føgur orð.

Skattafría grunduppfhæddin skal hækka munandi.

Hjún við einari inntøku skulu javnstillast við hjún við tveimum inntøkum.

Avgjøld, ið raka láginntøkur harðast, verða avtikin, serliga útvarps-og sjónvarpsgjald, punktgjald, ferðaavgjald og oljuavgjald.

Fyri almennu kassarnar merkir hetta í fyrstu atløgu lægri inntøkur. Tí má henda lækkingin mótsvarast við skilagóðum tiltøkum.

Almenni bygnaðurin skal skipast betri, so hann verður ódýrari.

Varligar privatiseringar skulu nýtast at gjalda almenna skuld við.

Mvg-inntøkurnar hækka, tá fólk fáa fleiri pengar um hendi.

Almennar íløgur í ellisheim og barnagarðar merkja, at nógv fleiri sleppa til arbeiðis og harvið framleiða og gjalda skatt.

Skatta-og avgjaldslækkingar merkja eisini, at búskapurin veksur og harvið veksa eisini inntøkurnar hjá tí almenna. Vit mugu bara tryggja okkum, at pengarnir ikki hesuferð fara til at spara upp til fullveldið og onnur luftkastell.



VALGREINAR

# Skulu 10 persónar eiga Føroyar?

**Kári Petersen**
*valevni javnaðarfloksins í Suðurstreymoy*



Um ein hyggur at konsentratiónstendensunum í føroyska vinnulívinum, so tekur tað bert 5-10 ár, so eiga 8-10 persónar næstan alt føroyskt vinnulív. Orsøkin er, at hesir persónar hava fingið ein framíhjárætt at troyta føroyska fiskiríkidømið. Tað, at nakrir fáir einstaklingar fáa hendan framíhjárætt fyri einki, ger, at teir eftir fáum árum koma at eiga næstan alt føroyskt vinnulív.

**Landsstýrið gevur nøkrum fáum persónum gávu við milliónavirði hvørt ár.**
Seinastu árini hava verið dømi verið frammi í bløðunum um, at persónar fáa veiðiloyvi frá landsstýrinum fyri einki, sum teir selja fyri milliónir nakrar fáar dagar seinni. Ofta eru eisini dømi um, at skip eru seld fyri fleiri tíggjutals milliónir, sjálvt um skipið í sær sjálvum bert er vert nakrar fáar milliónir.

Tað, sum í veruleikanum verður selt, eru veiðirættindini, sum fylgja við skipinum. Sjálvt um tað stendur í lógini, at fiskiríkidømið við Føroyar er ogn Føroya fólks, so kunnu einstaklingar selja hesa ogn og koyra vinningin í egnan lumma. Ein stórur órættur verður framdur móti Føroya fólki hvørt ár. Ogn Føroya fólks, sum er verd fleiri tíggjutals milliónir hvørt ár, kanska hundraðtals milliónir, verður latin nøkrum fáum einstaklingum fyri einki.

Ungir menn kunnu als ikki koma inn í fiskivinnuna. Um teir vilja keypa skip, noyðast teir samstundis keypa veiðirættindi frá onkrum reiðara. Veiðirættindini kosta munandi meira enn sjálvt skipið kostar, og peningastovnarnir kunnu ikki veita lán til samlaða keypið, tí teir kunnu ikki taka pant í veiðirættindinunum. Ungir menn kunnu sostatt ikki keypa skip, uttan teir gjalda nógvar milliónir kontant til verandi reiðarar fyri fiskiloyvið. So nógvar milliónir eru sera fáir sum eiga., og eingin, sum ikki frammanundan eigur skip, hevur møguleika at fara inn í fiskivinnuna. Sostatt eru fleiri orsøkir til, at verandi skipan má metast at vera sera órættvís.

**Tilfeingisrentan stavar frá einkarrætti hjá nøkrum fáum at troyta fiskatilfeingið.**
Tær milliónirnar, sum veiðirættindini kunnu seljast fyri, verða ofta nevndar tilfeingisrentan.

Tilfeingisrentan er eitt eykaavkast, sum stendst av, at nøkur fá fáa einkarrætt at troyta náttúrutilfeingið.

Um stórt avkast er í vanligum vinnum, so eru nógv, sum stovna virki í hesum vinnum, og harvið kunnu øll fáa lut í tí stóra avkastinum. Tað at onnur koma aftrat, førir við sær kapping, og kappingin ger, avkastið minkar spakuliga niður móti einum vanligum avkasti.

Men í fiskivinnuni er eingin fríur atgongurættur. Tann, sum stendur uttanfyri fiskivinnuna, hevur ikki rætt til frítt(ókeypis) at koma inn í vinnuna.

Tað óvanliga stóra yvirskotið hjá fiskivinnuni stavar sostatt frá, at nakrir fáir einstaklingar hava einkarrætt at troyta tað virðismikla føroyska náttúrutilfeingið, og harvið hava rætt til at halda øll onnur úti. At eingin nýggjur kann koma inn í vinnuna, tryggjar, at teir, sum frammanundan eru í fiskivinnuni, framhaldandi kunnu fáa risastór yvirskot. Aðrir kunnu ikki fáa part í hesum stóru yvirskotum, av tí einfaldu orsøk, at teir verða forðaðir í at fiska.

**Um 5-10 ár eiga 10 persónar alt føroyska vinnulívið.**
Í Íslandi komu nakrir einstakir reiðarar at eiga kvoturnar, tá kvotuskipanin varð gjørd. Kvotueigararnir hava síðan kunna selt veiðirættindini til teir, sum reka og eiga skipini. Hesi veiðirættindi eru vorðin sera nógv verd, og teir, sum selja veiðirættindi (kvotabarónarnir), fáa stórar milliónainntøkur afturfyri at selja, tað sum annars sambært lógini er ogn hjá íslendska fólkinum. Í tíðini áðrenn kvotulógirnar var stórkapitalurin spakuliga byrjaður at konsentrerast um nakrar persónar. Í dag eiga umleið 15 familjur meginpartin av íslendska vinnulívinum. Alt hetta er hent tí politiska valdið í Íslandi hevur latið nøkrum fáum fólkum veiðirættindini fyri einki, so tey kunnu selja tey aftur við stórum milliónavinningi.

Sama gongdin er nú byrjað í Føroyum. Nakrir fáir reiðarar hava nú so stórar inntøkur, at teir ikki vita, hvat teir skula gera við peningin. Peningurin verður nú settur í øll møgulig onnur sløg av íløgum, handilsbygningar, sølufyritøkur, fastar ognir, jørð osfrv. Um gongdin heldur fram 5-10 ár aftrat, so fara 10 persónar skjótt at eiga stórt sæð alt føroyska vinnulívið.

**Javnaðarflokkurin er einasti flokkur, sum fer at arbeiða ímóti, at nøkur fá gera sær dælt av ogn Føroya fólks.**
Tað er við at ganga upp fyri Føroya fólki, at tey verða snýtt í hesum máli. Hitt virðismikla føroyska fiskatilfeingið(ogn Føroya fólks) verður selt fyri milliónir, men Føroya fólk fær einki. Tað er torført at meta neyvt, hvat veiðirættindini eru verd, men Menas frágreiðingini heldur virðið liggja millum 200 og 500 milliónir um árið. Sostatt verða stór almenn virðir hvørt ár givin nøkrum fáum reiðarum.

Ætlar Føroya fólk at forða fyri, at alt føroyska vinnulívið skal enda í hondunum hjá 10 einstaklingum, og ætlar Føroya fólk, at yngri menn skulu hava møguleika at koma inn í fiskivinnuna, so er neyðugt at velja Javnaðarflokkin. Javnaðarflokkurin er einasti flokkur, sum greitt hevur sagt frá, at kemur hann í samgongu, so fer hann at arbeiða ímóti, at nakrir fáir framhaldandi kunnu gera sær dælt av ogn Føroya fólks.

www.karipetersen.com

# Visiónir í heilsuverkinum

**Elsa í Garði**
*valevni Fólkafloksins í Suðurstreymi*



- Álitið um Heidarpsykiatri 2002 verður framt í verki.
- Kortleggjan av øllum virkseminum í samlaða Heilsuverkinum.
- Gera sær greitt hvat man vil viðgera, og á hvørjum støði viðgerðirnar skulu vera.
- Gera sær okkum hvussu vit skulu náa hesum málum.
- Tann føroyski borgarin fær atgongd til arðar heilsutænastur, - eitt nú eisini í Skotlandi, USA, Týsklandi m.m
- Serfrøðingarnir (tvs. serlæknarnir og onnur) upplýsa almenningin og politikarar um sítt arbeiðisøki.
- Nútímans hølir: At tað nýggja sjúkrahúsið verður liðugt til ætlaðu tíðina, og at tað gamla verður umvælt sum skjótast.
- Skrásetingin av Krabbameinstilburðunum eigur at fáast at virka aftur!

Hetta við gransking fyri eyga. Granskingarmøguleikarnir eru serliga góðir í føroyska sjúklingabólkinum. Her hevur føroyski læknin Jan Dalberg longu gjørt eitt megnar retrospektivt (afturlítandi) arbeiði, men vegna vánaligar skrásetingarmøguleikar, fær hann ikki gjørt nakað við prospektiva (frameftirlítandi) partin.

- Barnagarð á Landssjúkrahúsið.

# Ungdómurin í Norðoyggjum

**Karl Olgar Joensen**
*valevni Sambandsfloksins í Norðoyggjum*



Vit fegnast um, at nú røkist fyri, at undirsjóvartunnilin gerst veruleiki. Eingin ivi er um, at fyrimunirnir við slíkum tunnli eru stórir. Men tá ið tosað verður um undirsjóartunnilin, verður spurningurin mangan reistur, um hetta er so gott fyri ungdómin.

Vit hava nógv tilboð til tey ungu í Norðoyggjum. Nevnast kann ítróttur av ymiskum slag, andalig møtir o.s.fr. Men vit vita eisini, at tað eru ung sum vilja hava nakað annað, til dømis dans.

Tá ið tosað verður um dans, so koma vit inn á náttarlívið hjá teimum ungu, og her er tað, at foreldur og avvarandi av ungdóminum síggja ein vanda við undirsjóartunnlinum. Fara tey ungu at koyra út í Eysturoynna ella til Havnar í dans, ja so verða nógvar svøvnleysar nætur hjá foreldrum, tí náttarkoyringin hjá ungdóminum er ógvuliga vandamikil.

Eg veit væl, at tað ikki er ein landsuppgáva at fáa til vega dansihølir í Klaksvík. Tó kemur landið inn í myndina, tá stuðul skal latast til ungdómshús o.tl.

Eg haldi, at vit í felag eiga at loysa hetta málið. Vit skulu geva ungdóminum møguleikar at verða her hjá okkum, so sleppast kann undan náttarkoyringini, sum tíverri mangan hevur havt syndarligar avleiðingar við sær.

# Miðflokkurin byggir á ein øðrvísi grundvøll – BÍBLIAN

**Jónfinn Olsen**
*Form. í UfM & valevni Miðfloksins í Suðurstreymoy*



Miðflokkurin vil arbeiða fyri at frálæran á skúlum og lærustovnum skal verða Kristni Í Kristnitímunum, tí í einum "Kristnum landi" eigur so at verða. Og tað skal verða Kristni, ið verður undirvíst í Kristnitímunum á skúlunum, hetta stendur millum annað í fólkaskúlalógini.

VEL MIÐFLOKKIN TÍN FRAMTÍÐAR TRYGGLEIKI Í POLITIKKI, TÍ VIT BYGGJA Á EIN ØÐRVÍSI GRUNDVØLL, IÐ ER BÍBLIAN.

MIÐFLOKKURIN TÍN RØDD Á LØGTINGI.